# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Esther Drewsen, Tórshavn:

## Seinasta starvsdag hjá P/F Auto

Mánadagin 27. mars hevði Esther Drewsen í Havn sín seinasta starvsdag á skrivstovuni hjá P/F Auto eftir næstan 40 ár í starvi.

Eftir at hava búð í Danmark í fýra ár flutti Esther heim aftur til Føroya í 1967. Tá byrjaði hon at ganga við rokningum fyri Auto, og síðan 1970 hevur hon arbeitt á skrivstovuni. Fyrstu tíðina var skrivstovan í ovastu hædd í Føroya Banka í N. Finsensgøtu. Seinni var flutt í onnur skrivstovuhølir hjá Andreas Jacobsen (Andreas í Køkubúðini) í N. Winthersgøtu, har skrivstovan var í mong ár.

Eftir at bygningurin hjá Auto varð liðugt umbygdur í 2003, hevur skrivstovan verið har í egnum hølum.



Esther sigur, at hon hevur trivist væl í hesum starvi, hon hevur arbeitt mitt í býnum og er komin at kenna nógv fólk. Hon nevnir t.d. at tá hon byrjaði, kostaði ein býtúrur 5 krónur, nú kostar hann 60.

Sum ung arbeiddi Esther fisk, var í handli og á skrivstovuni hjá Valdemar Lützen í 6 ár. Hon búði í Danmark frá 1963-67, har hon eisini hevði skrivstovuarbeiði.

Esther er úr Havn og er í dag 68 ára gomul. Foreldrini vóru Kristina, f. Samuelsen, ættað úr Sumba, og Ansgar Nolsøe av Tvøroyri. Esther er næstelst av 6 systkjum.

Í 1965 giftist hon við Benny Drewsen úr Keypmannahavn, tey eiga trý børn: Svend Åge, sum býr í Hoyvík, Eyðfinn, sum býr í Kollafirði, og Anita, sum býr í Havn. Barnabørnini er trý.

Spurd hvat hon fer at gera nú, sigur Esther, at nú fer hon at geva sær meira tíð til familjuna og at vera saman við manninum, sum av heilsuáðum býr í Danmark. Hann býr í Skovlund, nærhendis Varde, í Jútlandi.

## Til Petrea's minde

Fagra blóma, tú sum prýðir, er en sang jeg tænker på når jeg mindes Petrea, for hun var et af de smukkeste mennesker jeg kender. Den hjertevarme hun modtog mig med, vil jeg aldrig glemme, hendes uselviske måde, gik med »træsko« på, lige ind til hjertet på mig, så mit savn bliver/er stort.

Jeg ville så gerne have haft meget mere tid med denne storsindede kvinde, for hun kunne bare give så meget at det var svært at opsamle det hele på engang, når vi var sammen. Den måde hun var familiens samlingspunkt på, var helt unikt. Det så jeg tydeligt på alle når jeg var på besøg eller fik besøg her i Herning. Petrea turde at være den kvinde hun var, at acceptere anderledes måder at være på, med kærlighed – det er stort – det får mig til at vende tilbage til sangen. Uanset om blomsten er en der vokser vildt eller en der er vokset op med omhyggelig pleje, er det en blomst der har sat dybe rødder og har spredt sine frø så man aldrig kan glemme hvordan den så ud og var.

Alle mine tanker er hos jer i denne stund.

**Lone i Herning**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Símin Højgaard, Runavík**, andaðist sunnudagin 26. mars á Landssjúkrahúsinum, 69 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum mikudagin 29. mars, kl. 17 í Glyvra Kirkju. Jarðarferðin verður hósdagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Símin, kunnu lata eina peningagávu til Føroya Felag Móti Krabbameini; konta í peningastovunum.

**Erling Michelsen**, fyrrverandi teligrafistur, andaðist á Landssjúkrahúsinum 27. mars, 75 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Axel Johannesen, ættaður úr Kollafirði**, búsitandi í Keypmannahavn, andaðist sunnudagin 26. mars 93 ára gamal. Jarðarferðin verður fríggjadagin 31. mars kl. 11 úr Vestre Lille Kapel á Vestre Kirkegård í Keypmannahavn.

**Niels Ole Lykke**, ættaður úr Skive, búsitandi í Kollafirði, andaðist í gjár 27. mars á Landssjúkrahúsinum, 64 ára gamal. Tey, ið vilja minnast Ole, kunnu lata eina peningagávu til Føroyskt Cystisk Fibrosu Felag; konta í peningastovunum.

**Dagurin í morgin**

**30. mars. Kvirinius**, deyður umleið ár 120. Rómverskur hermaður, sum gjørdist kristin og varð tikin av døgum.

## 1. apríl – tiltak fyri alt húskið



Hetta er ikki ein »aprílsøga, men eitt rimmar tiltak ì Argja-skúla.

8. b ì Argja-skúla ætla sær eina Námsferð til London komandi heyst.

Hóast tey í fleiri ár hava samlað pening til ferðina, so manglar nakað í.

Tey skipa fyri einum familju-tiltaki ì Argja-skúla leygardagin 1. apríl kl.14.

Har verður m. a. hoppiborg, mat- og bommtombola, fiskibrunnur, loppumarknaður, andlitsmáling, hárprýði, bilvask, kaffisøla og nýbakaðar vaflur. Eisini ber til at keypa fryst fiskaflak.

Tey gleða seg nógv til ferðina og vænta at uppliva eina rúgvu. London hevur nógv at bjóða, og tey ætla m. a. at vitja á voksmuse'num Madame Tusssauds, London Eye, og til onkran sangleik.

London er jú rættiliga kent fyri sínar sangleikir, og í løtuni eru tað serliga »Mama mia« og »We will rock you«, ið eru væl umtóktir.

Flokslærarin, sum eisini hevur tey í enskum, skal við teimum. Hann heldur tað verða spennandi,at tey royna tað enska, hann hevur lært tey.

Ger 1. apríl til ein hugnaligan leygardag-seinnapart, við at fara ein túr út í Argjaskúla, heilsa tey av Argjum.

## Tøkk



Inniliga takki eg tykkum øllum, sum mintust til mín, 90 ára føðingardagin 10. januar.

Tøkk øll tit sum komu í neystið, tit sum ringdu frá nær og fjar og tøkk øll sum sendu telegramm og blomsturheilsanir, og fyri allar gávurnar.

Hjartaliga tøkk øll somul, tit virkuliga gleddu meg. Tær kærastu heilsanir sendast tykkum øllum, eisini ein stór tøkk til míni børn.

Dinna Dalsgarð
Bakkagøta 4
Argir

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi í stóru sorg okkara, tá høgt elskaða kona mín, mamma, vermamma og omma okkara

**Hanna Elisabet í Kálvalíð Hansen**
Miðvágur

so brádliga bleiv heimkallað til Harran.

Hjartans tøkk til Sverra Steinhólm prest fyri góð og troystarrík orð í kapellinum, og Ingu Poulsen Dam prest, í kirkjuni.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar og berarar.
Tøkk fyri blómur, heilsanir og peningagávur og tykkum, sum skipaðu fyri ervinum, hjartans tøkk øll somul.
Tøkk til hvønn einstakan av tykkum í tí stóru mannfjøld, ið fylgdu henni á hennara seinastu ferð her á fold, vilja vit veita eina hjartans tøkk.
Má Harrin signa tykkum øll.

**Páll, Jógvan Helgi, Herborg, Hans við familjum**